# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## FØÐINGAR

31. juli fingu Osla Jacobsen og Poul Hammer, Tvøroyri, ein son. Hann var 46 cm. langur og vigaði 2150 gr.

31. juli fingu Mary og Rúni Christiansen, Klaksvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4750 gr.

1. august fingu Lovisa og Jan Nielsen, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3700 gr.

2. august fingu Jana Madsen, Kollafjørður og Marius Joensen, Norðskála, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4000 gr.

3. august fingu Malan og Dia Petersen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4150 gr.

3. august fingu Unnur á Dunga og Dánjal Egilstoft, Vejle, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4170 gr.

4. august fekk Helgi tvær systrar. Tær vóru 48 cm. langur og vigaði 2115 og 2300 gr. Foreldur teirra eita Jónvør og Ólavur Bjarkhamar, Froðba.

4. august fingu Anna Maria og Heini Ellingsgaard, Tórshavn, eina dóttur.Honv ar 54 cm. long og vigaði 3530 gr.

4. august fingu Rúna Tausen og Hjalti á Lava, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4030 gr.

5. august fingu Miriam og Hans Petur Weihe, Sandavágur ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4040 gr.

5. august fingu Selma og Petur Larsen, Norðragøta, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 3950 gr.

5. august fingu Hertha og Marni Eliasen, Klaksvík, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4765 gr.

9. august fingu Heidi Johansen og Høgni Lauritsen, Argir, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3800 gr.

9. august fingu Tórhalla Gullbein, Tórshavn og Reidar Kirke, Saltnes, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4050 gr.

10. august fingu Maurenn Djurhuus Clarke, Tórshavn og Christopher Clarke, Ongland, ein son. Hann var 55 cm.langur og vigaði 3550 gr.

11. august fingu Annika og Dávid Isfeld, Herlev, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3750 gr.

11. august fingu Katrin Jørgensen og Per Joensen, Miðvágur, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4100 gr.



Nomi J. Haraldsen Miðvág búsitandi í Skanderborg hevur átt hesa deiligu gentu tann 13-07-2004 hon vigaði 2480gr. og var 50 cm. long



Eg eiti Benjamin Sung Norðberg, og eg eri føddur jóladag í fjør. 11. juli kom eg til míni nýggju foreldur, sum eru Póla og Mortan Norðberg í Vági.



5 august fingu Erik og Eyðbjørn ein lítlabeiggja. Hann vigaði 4765 gr og var 56 cm langur. Foreldur teirra eru Hertha og Marni Eliasen, Klaksvík



1. august fingu Fríða Olsen og Torbjørn Hjelm, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 2900 gr.

## Líggjas Eliassen deyður



Hósmorgunin 5. august andaðist Líggjas í Hússtovu í Mikladali, 83 ára gamal. Hann doyði heima hjá dóttrini, sum passaði hann ta seinastu tíðina.

Líggjas var sonur Mathildu, ættað úr Lorvík, og Magnus Eliassen bónda í Hússtovu. Hann giftist í 28. januar 1951 við Margretu úr Lorvík, dóttir Edith og Sigurð Andreasen. Líggjas tók við Hússtovufestinum eftir pápan, sum gjørdist avgamal maður, 99 ár. Margreta og Líggjas hava búð í Mikladali alla tíðina, síðani tey giftust.

Tað gekk ikki so væl við øllum fýra børnunum, tey fingu. Í 1951 fingu tey Sigrun, men hon doyði hálvtannað ára gomul. Í 1954 fingu tey Magnus, sum doyði fýra ára gamal. Í 1966 fingu tey tvíburadøturnar Magnu og Sigrun. Eisini Magna doyði fýra ára gomul.

Sigrun er gift við Jógvan Sámal Heldarskarð úr Klaksvík, og tey eiga døturnar Margret 11 ár, Marta 8 ár og Elisa 5 ár. Tey høvdu Hússtovufestið í nøkur ár, men søgdu tað frá sær, og síðani hevur Eyðun, systkinabarn Sigrunar, fest. Sigrun og Jógvan Sámal hava hús í Klaksvík. Hon arbeiðir sum sjúkrasystir, og hann siglir sum maskinmaður.

Líggjas í Hússtovu var fróður maður. Hann hevði eina stóra vitan, var kønur við penninum og dugdi eisini at yrkja.

Tað vóru bara fýra vikur ímillum teir báðar brøðurnar í Hússtovu. Eivind, sum var tann yngri, doyði av blóðtøppi 8. juli, og 5. august andaðist Líggjas eftir sjúkralegu við krabbameini. Báðir vóru kirkjutænarar. Eivind tók við sum deknur eftir pápan Magnus og røkti starvið í 18 ár, og Líggjas var organistur í meira enn 60 ár.

## Konfirmantar hittast eftir 60 ár

**Tey, sum konfirmeraðust í Nes Kirkju 8. oktober í 1944 hittast á Runarvíkar Sjómansheimi**

KONFIRMATIÓN

_ Vit ætla at hittast aftur á 60 ára konfirmatiónsdegnum á Runavíkar Sjómansheimi fríggjakvøldið 8. oktober kl 19 til eitt døgurðaborð.

Soleiðis siga fyrireikararnir til henda 60 ára dagin.

Øll tey, sum konfirmeraðust henda dag, ið eru á lívi, eisini tey, hvørs maki er deyður meðan tey liva eftir, eru hjartaliga vælkomin á Sjómansheimið, siga fyrireikararnir, sum høvdu verið takksom fyri, um fólk gjørdu vart við seg beinan vegin til ein av fyrireikarunum, sum eru:

Fanny Djurhuus, Innan Glyvur, tel 44 73 73

Irena Johansen, Strendur, tel 44 74 29

Johan Kass, Strendur, tel 44 72 22



*Konfirmantar í Nes kirkju, heystið 1944 á 50 ára veitslu 7. oktober 1994: Daniel Gaardbo, Nes. Jógvan I. Olsen, Petur Gaardbo, Tóra Højgaard, Toftir. Sigurd Hansen, Jacob Davidsen, Margit Petersen, Runavík. Óli Finnsson, Fanny Davidsen, Glyvrar. Sofus Foldbo, Leirvík. Anna Sofía Mikkelsen, Oluffa Mikkelsen, Skáli. Fanny R. Djurhuus, Innan Glyvur, Johan Kass, Martin Johansen, Hillebert Johannesen, Irena Johansen, Strendur, Sverri Egholm, Betty Mikkelsen, Emmy Hermansen, Cristiane Christiansen, Tórshavn, Helga Dam, Sandavágur, Jóhanna Lund, Vejle*

## ANDLÁT

**04.08**
Poul Kjærbo úr Vági, 77 ár.

**05.08**
Líggjas Eliasen, ”Líggjas í Hússtovu” í Mikladali, 83 ár.

**09.08**
Jacob Midjord, Porkeri, fyrrverandi bedingsmeistari í Vági, 83 ár.
Jenny Østerø, ættað av Syrðadali, búsitandi í Klaksvík, 78 ár.

**10.08**
Poul Johan Olsen, ættaður av Toftum, 64 ár.
Anna Joensen í Sumba, vanliga nevnd Anna í Víkabyrgi, 92 ár.
Rigmor Hammer í Tórshavn, ættað úr Svínoy, 82 ár.



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Jógvan Andras Joensen 70 ár



Mánadagin 16. august, fyllir Jógvan Andras Joensen í Havn 70 ár. Mong kenna hann helst betri sum Jógvan í Innbúgv.

Hendan fryntliga, prátingasama mannin, sum, uttan at taka munnin ov fullan, kann tosa við øll fólk, og eisini fegin ger tað.

Jógvan er eiðismaður av uppruna. Sonur Elly og Edvard Joensen, Edvard í Skorini. Og ongantíð er nakar í iva um, at hann veit, hvør hann er. Er nakar, sum er ættkærur og kennir til ætt, er tað Jógvan. Nevn orðið ætargransking, so er hann við. Og sleppur hann, roknar hann í eini handavending ættina uttan steðg í beinari linjum aftur til Heina Havreka.

Jótgvan fór ungur av Eiði. Fór sum 12 ára gamal til Klaksvíkar at ganga í skúla. Síðan hevur hann nomið sær læru sum møbilpolstrari, ið gjørdist hansara lívsstarv. Og hann er «still going strong«, hóast hann í fleiri ár hevur tosað um, at nú má hann fara at slakka av. Men tað dugir hann eftir øllum at døma ikki.

Hóast hann altíð hevur havt ríkiligt at gera í sinum arbeiði, hevur hann kortini fingið tíð til ymisk frítíðarítriv.

Øll, sum seinast 50 árini ella so hava havt nakað samband við fráhaldarørsluna í Føroyum, kenna Jógvan. Hann hevur verið virkin í losjuni í ein mansaldur at kalla. Ungmannadeildini í Havn og seinni eisini í losjuni Støt Viljen, har hann hevur verið ein av høvuðsstuðlunum.

Tá Ungmannadeildin í síni tíð tók ítróttarliga táttin upp og stovnaði ungmannafelagið Kyndil, var Jógvan í fremstu røð. Hann er skrásettur sum limur nummar eitt í Kyndli og var eisini fyrsti formaður felagsins. Sjálvandi spældi hann eisini hondbólt við Kyndli. Eisini hevur hann í sínum ungu døgum spælt fótbólt við HB, har hann millum annað var við at vinna okkurt meistarheiti í yngru deildunum.

Ein søga gongur um hann, tá hann var í Danmark í útbúgvingarørindum. Tá skuldi hann vinna sær nøkur oyru við at selja ís í Ítróttarparkini. Men sølan var einki serlig, tí hann var meira upptikin av dystinum enn av at selja hesar góðu ísar.

Jógvan hevur bát, sum hann tó viðgongur, at hann er ov sjáldan í. Men kanska tað fer at broytast? Hvør veit?

Eftir at hann gavst við møblasøluni Innbúgv, hevur Jógvan polstrað burturav. Og nokk er at gera. Fólk vilja fegin sleppa at sita í gomlu sofuni hjá ommuni. Og ikki er eiðasørt, at hann hevur annað at gera eisini. Eitt nú eru rættiliga nógvir skipsmenn, sum dagliga sita í stólum og á beinkjum, sum Jógvan hevur polstrað.

Jógvan er giftur við Lauru, dóttir Sigrid og Thomas G. Thomsen úr Vestmanna.

Jógvan og Laura eiga børnini Sigrid, sum býr í Danmark, og Edvard, sum býr í Havn. Ommu- og abbabørnini eru seks í tali.

**ej**

## Hergeir hálvt hundrað



Í dag, leygardagin 14. august, verður Hergeir Reinert í Havn 50 ár. Hann hevur í mong ár verið smiður, og tað eru ikki so fá, sum eiga hús, sum Hergeir hevur smíðað.

Hergeir er sonur til Agnas og Gimma Reinert. Hann er næstyngstur av seks systkjum. Tey eru Anna, Andrea, Hansa, Gunvør, Hergeir og so Finnur, sum doyði fyri nøkrum árum síðani.

Hergeir býr saman við Anitu. Tey eiga eina dóttur, sum eitur Bjørk. Frammanundan átti Hergeir Boga, Pætur og Bjartur, og Anita átti Hanus og Svein.

Hergeir lærdi fyrrapartin av sjeyti árunum hjá Kurt Hansen og Sten Lorentzen. Hann varð avlærdur í 1976. Meðan hann stóð í læru arbeiddu Hergeir og teir nógv í Eysturoy, har teir eitt nú bygdu virkisbygningin hjá Bakkafrost.

Síðani hann var avlærdur, hevur Hergeir verið sín egni arbeiðsgevi. Hann hevur arbeitt saman við Suna Olsen, sum er ættaður úr Tjørnuvík. Teir hava bygt eina rúgvu av sethúsum, og teir eru tiltiknir fyri at vera nærlagdir og snøggir smiðir. Teir hava nógvar fastar kundar, sum teir aftur og aftur gera viðlíkahaldsarbeiði fyri. Eitt nú hava teir í mong ár um jóltíðir tikið sær av viðlíkahaldinum á Hotel Hafnia.

Vinmenn heilsa Hergeiri og hansara og ynska hjartaliga tillukku við degnum.

## BRÚDLEYP

Mánadagin 12. juli 2004 *giftust* Agnes Vágseið og Tommy Sivertsen úr Klaksvík á Kalundborg Rådhus.

Í dag, 14. august kl. 13.00 giftast í Vesturkirkjuni Hansa Simonsen úr Norðragøtu og Jan Eli Dam úr Tórshavn. Vígslan verður í Vesturkirkjuni kl. 13.00. Veitslan verður fyri innbodnum í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.00.

Í dag, 14. august kl. 14.00 giftast í Simon Peters kirkju á Amager Dorte Krahl, Keypmannahavn og Høgni Dalsgaard, Glyvrum. Receptión verður í heimi teirra á Backersvej 169 aftaná vígsluna til kl. 17.00.

Í dag 14. august kl. 17.00 giftast í Sankta Birgitta kyrka Maiken Solveit Poulsen, Tórshavn og Leif Erik Englund, Norrby. Brúdleypsadr.: Snickargränd 11, AX-22610 Lemland, Áland.

## GULLBRÚDLEYP

Sunnudagin 15. august hava hjúnini Laura og Absalon Lydersen á Kirkjui gullbrúdleyp. Tey, ið ynskja at heilsa upp á gullbrúðarparið, eru vælkomin í gullbrúdleypið 15. august kl. 18.00. Í samband við gullbrúdleypið siglir Másin av Kirkju mánamorgunin 16. august kl. 05.30.

## 60 ÁR

Mánadagin 16. august fyllir Óluva Hansen, Margretheparken 52, 1. tv., 9850 Hirtshals, 60 ár.

## 70 ÁR

Í dag verður Poula Jacobsen, Klaksvík, 70 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

Mánadagin 16. august verður Jógvan Andras Joensen, møbiulpolstrari, Tórshavn 70 ár. Tey, iðvilja gleða Jógvan við at heilsa uppá hann føðingardagin, eru hjartaliga vælkomin í losjuhúsið, Tinghúsvegur 18, har borðreitt verður við nátturða og drekkamunni frá kl. 19.00.

## PRÓGV

Olevina Jacobsen, Klaksvík, hevur fingið prógv sum bakari. Hon fekk heiðursmerki í bronsu fyri sveinastykki á tekniska skúla í Holstebro. Olevina varð útlærd 16. juli. Læruplássið var bakaríið hjá Jórun í Klaksvík, og lærumeistari var Jórun Mørkøre.

## Tøkk

Hjartaliga takki eg tykkum øllum ið gjørdu mær 80 ára føðingardagin ógloymandi.
Tøkk til tykkum, ið løgdu alt so væl til rættis.
Tøkk fyri frálíka borðreiðing og serstakliga til tær fyrrvernadi skótagenturnar ið hugnaðu um við gulum skótaturriklæði.
Tøkk til Frelsunarherin, sílaveiðufelagið og tykkum øll, ið møttu í salinum.
Tøkk fyri gávur, blómur, fjarrit og hugnaligar telefonsamrøður.
Má Harrin ríkiliga vælsigna tykkum øll.

**Vinarlig heilsan Sofía Jacobsen**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum sum á ymiskan hátt vístu okkum samkenslu og hjálpsemi, tá okkara elskaði maður, pápi, verpápi og abbi

**Arni Samuelsen**
Klaksvík

varð tikin frá okkum.

Tøkk fyri blómur, kransar og gávur og tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

**Paulina, Lisbeth, Birgit,**
**Magnus, Lina og Ida**

†

Kunngjørt verður at mín høgt elskaða mamma, vermóðir, omma og systir okkara

**Elin S. Petersen**
vanliga nevnd Elin í Puntabyrgi, Tvøroyri

andaðist á Landssjúkrahúsinum 12. august, 61 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju sunnudagin 15. august kl. 13.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Dagmar**

Um nakar ynskir at minnast Elin kunnu tey ístaðin veita eina peningagávu til Føroya Felag móti Krabbameini

## Dagurin

**Eusebius.** Fleiri halgimenni at navni Eusebius eru knýtt at degnum 14. august.

15. august. **Mariumessa.** Hildin til minnis um himmalsferð Mariu. Dagurin varð eisini róptur *mariumessa í hoyna.* Tendringin um hetta mundið eitur í hoyna.

*Jákup Jakobsen doyði hendan dagin í 1918.*